**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu**
(Ferðavinnulógin)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10., 17., 22. og 29. apríl og 1., 8., 10. og 11. mai 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Jónfinn Thomsen, advokat, Annfinn V. Hansen, advokat, Jógvan Páll Lassen, advokat, Bárð Larsen, lektara í løgfrøði, Eyðbjørn Larsen, advokat, Føroya Óðalsfelag, Bóndafelag Føroya, Kommunufelagið, umboð fyri kommunur, Hagafelagið, Visit Faroe Islands, Hiking.fo, Ferðaleiðarafelagið, Greengate Incoming, Ferðavinnufelagið, GoLocal, Faroeway Adventures, Jóhannus Kallsgarð, bónda, Nípuna og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Uni Holm Johannesen, Karlot Hergeirsson og Annika Olsen) hevur hesar viðmerkingar:

Føroyar og politiska skipanin hava fyri nógvum árum síðan valt at satsa upp á ferðavinnuna ella upplivingarvinnuna, har náttúran er høvuðsferðamálið og tað, sum skal eggja útlendingum at koma til landið.

Ferðavinnan er eins og fiski- og alivinna ein vinna, sum skapar valutainntøkur fyri Føroyar.

Ferðavinann hevur í eini 30 ár verið í einari uppbyggingarfasu soleiðis at skilja, at ferðavinnan hevur gjørt nýíløgur í hotell og matstovur, útvegað kapital til íløgur, útbúgving av teimum, sum starvast í vinnuni og ment eina røð av ferðatilboðum til tey ferðandi. Vinnuferðavinna (ráðstevnur o.a.) er eisini partur av hesari menning og vøkstri í ferðavinnuni.

Politiskt hevur málið við einari ferðavinnu verið at skapa eitt triðja vinnubein at standa á hjá Føroyum og skapa ein diversifiserða vinnu, soleiðis at tað í størri mun slepst undan ov stórum sveiggjum í búskapinum, í førum har ein vinnugrein er fyri afturstigi.

Ferðavinnan hevur í hesari uppbyggingarfasuni stóran tørv á stabilum vinnukørmum, soleiðis at vinnan ikki verður fyri afturstigi, og at vinnuligi áhugin ikki minkar.

Galdandi lóggáva, sum regulerar gongd í haga, er frá 1937 og er harvið 87 ára gomul.

Samgongan hevur í hesum sambandi lagt fyri Løgtingið eitt lógaruppskot, sum er við til at skapa karmar fyri ferðavinnuna og tey, sum reka landbúnað, umframt geva kommununum saman við bóndum og heimafólki heimild at skipa ferðavinnuvirksemi.

Meirilutin hevur gjørt eina politiska semju um hetta lógaruppskotið, men har nógvar og grundleggjandi broytingar síðan verða gjørdar í upprunaliga uppskotinum. Mett verður, at semjan fær sera stóra positiva ávirkan fyri tey, sum eru partur av ferðavinnuni og fyri bøndurnar, umframt annað avleitt virksemi.

Viðmerkjast kann, at fyriliggjandi uppskot byggir á eina umfatandi hoyring av øllum teimum, sum beinleiðis og óbeinleiðis eru partur av málinum og hava royndir og innlit á økinum.

Heilt ítøkiliga fer hetta uppskotið at merkja:

- Fyri føroyingar verður tað frítt at ganga á bygdagøtum, hagagøtum, uttangarðs og fram við strondini undir ábyrgd. Við ábyrgd fylgja altíð skyldur, og merkir hetta, at eisini føroyingar sum ætla sær ein túr í hagan,  mugu kunna seg um viðurskifti, sum eru galdandi fyri økið tey ætla sær í, tá tey ætla sær.

- Fyri útlendsk ferðafólk er frítt at ganga á bygdagøtum, á útvaldum hagagøtum og fram við strondini. Ferðavinnuætlanirnar avgera, hvørjar útvaldu hagagøturnar eru.

- Handilslig ferðavinna, herundir bólkar, kann bert útinnast og skipast í samráð við bóndan sambært avtalu, sum samstundis hevur heimild til at krevja eitt gjald mótvegis tænastu. Bóndin kann eisini krevja gjald á serligum farleiðum uttangarðs frá ferðafólki annars, ímóti at veita tænastu.

Meirilutin setur tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 3 verður orðað soleiðis:
“**§ 3**. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í ferðavinnuætlanum sbrt. § 6 í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, í øðrum løgtingslógum og lógum, kunnu ferðafólk ferðast til gongu undir egnari ábyrgd á bygdagøtum, á útvaldum hagagøtum og fram við strondini.”

**2.** Í § 3 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 2.* Kommunan tekur, í samráð við bóndan, avgerð um, hvørjar hagagøtur eru útvaldar sambært stk. 1.”

**3.** § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Øll, sum ferðast ella uppihalda sær á bygdagøtum, á útvaldum hagagøtum og fram við strondini, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru náttúru, fenaði, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa.”

**4.** Í § 5, stk. 1 verður aftan á “útinnast” sett: “og skipast”.

**5.** § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Bóndin kann avmarka virksemi eftir stk. 1, sbr. § 11, stk. 3, men kann ikki geva fyriskiparum einkarætt. Bóndin kann kortini krevja, at avtala um virksemi eftir stk. 1 er gjørd frammanundan.”

**6.** Í § 5 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 3*. Í sambandi við handilsliga ferðavinnu og frá ferðafólki annars kann bóndin taka eitt rímiligt gjald fyri tænastu.”
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

**7.** § 5, stk. 3, sum verður stk. 4, verður orðað soleiðis:
“*Stk. 4*. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um virksemi sambært stk. 1 og 2 og um tænastur sambært stk. 3.”

**8.** § 6, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Allar kommunur skulu, saman við bóndum, heimafólki og øðrum viðkomandi pørtum, gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað og fyriskipað soleiðis, at tað í minst møguligan mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar.”

**9.** § 6, stk. 3 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 3*. Ferðavinnuætlanin, sum skal góðkennast av landsstýrisfólkinum, skal vera liðug í seinasta lagi 31. desember 2025.”

**10.** Yvirskriftin yvir § 7 verður strikað.

**11.** § 7 verður strikað.

**12.** Í § 8, sum verður § 7, verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 3*. Tað er ábyrgdin hjá viðkomandi bónda at gera og halda farleiðirnar, har hann tekur eitt gjald sambært § 5, stk. 3, bæði innangarðs og uttangarðs.”
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

**13.** § 9, stk. 1, 2. pkt., sum verður § 8, stk. 1, 2. pkt., verður strikað.

**14.** Í § 10, sum verður § 9, verður “§ 9” broytt til: “§ 8”.

**15.** § 11, stk. 1, sum verður § 10, stk. 1, verður orðað soleiðis:
“Kommunan kann, í samráð við bóndan, áseta reglur um, at tað í økjum, har serliga vandamikið er at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast saman við staðkendum fólki.”

**16.** Í § 11, stk. 2, sum verður § 10, stk. 2, verður “Landsstýrisfólkið” broytt til: “Kommunan”.

**17.** Í § 13, stk. 1, sum verður § 12, stk. 1, verður “§ 12” broytt til: “§ 11”.

**18.** § 14, sum verður § 13, verður orðað soleiðis:
“**§ 13**. Øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, og sum rinda fyri at gista, skulu rinda eitt gistingargjald upp á 20 kr. fyri náttina, tó ikki meira enn 200 kr. tilsamans.
*Stk. 2*. Gistingarhús, tjaldingarpláss, campingpláss og privat, sum veita gisting móti gjaldi, t.d. við Ból og bita, skulu leggja gistingargjaldið afturat kostnaðinum fyri gisting, og tann, sum leigar út um netborin sølutorg, skal leggja gistingargjaldið afturat leiguni.

*Stk. 3*. Seglbátar o.tíl., sum leggja at í Føroyum, skulu gjalda havnarmyndugleikanum gistingargjaldið saman við havnargjaldinum.
*Stk. 4*. Gjaldið, nevnt í stk. 2-3, verður goldið landinum á sama hátt sum ferðagjaldið, sbr. § 1, stk. 3, í løgtingslóg um ferðagjald."

**19.** § 15, sum verður § 14, verður orðað soleiðis:
"**§ 14**. Gjaldið, sum verður tikið inn eftir § 13, verður goldið í grunn. Peningurin í grunninum er markaður til, eftir umsókn, at gera ferðavinnuætlanir, at gera og halda viðlíka farleiðir eftir § 7, umframt til onnur átøk, sum skipa ella menna ferðavinnuna kring landið.
*Stk. 2*. Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri, sum landsstýrisfólkið velur. Landsstýrisfólkið velur formann og varaformann, og hinir fýra nevndarlimirnir og varalimirnir verða valdir soleiðis: Ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag í felag, ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Tjóðsavninum og Umhvørvisstovuni í felag, ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Ferðavinnufelagnum og Visit Faroe Islands í felag, og ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.
*Stk. 3*. Landsstýrisfólkið ásetur neyvari reglur fyri virksemi hjá stýrinum.
*Stk. 4*. Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum. Roknskaparhaldið skal fylgja løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a. Roknskapurin verður grannskoðaður av landsgrannskoðanini.
*Stk. 5*. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um umsiting, samsýning og virksemi grunsins og hevur eftirlit við grunninum. Verður grunnurin tikin av, verða ognir grunsins fluttar landskassanum."

**20.** § 16, stk. 1, sum verður § 15, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í § 4, stk. 1 og 2, § 5, stk. 1, § 11, stk. 1 og 2 og § 13, stk. 2-5."

**21.** Í § 16, stk. 3, sum verður § 15, stk. 3, verður "§ 9" broytt til: "§ 8" og "§ 13" broytt til: "§ 12".

**22.** § 17, stk. 2, sum verður § 16, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. §§ 13, 14 og 18 fáa gildi 1. oktober 2025."

**23.** § 17, stk. 3 verður strikað.

**24.** Aftan á § 17, sum verður § 16, verður sett:
"**§ 17**. Áðrenn 1. oktober í øðrum hvørjum ári leggur landsstýrisfólkið fyri Løgtingið frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um burðardygga ferðavinnu í Føroyum. Frágreiðingin verður fyrstu ferð løgd fram í 2027."

**25.** Í § 18 verður í stk. 2 aftan á 1. pkt. sett:
"Gjaldið, sum hesi ferðafólk rinda, verður flutt í grunnin, sum er skipaður sambært løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu."

**26.** § 19, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"Í § 41 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Ásetingin í 1. pkt., 1. liði, er ikki galdandi fyri íbúgvar landsins, sum tí hava frítt at fara undir ábyrgd."

Viðmerkingar:

Ad. 1.
Við broytingini kunnu ferðafólk, umframt á bygdagøtum og fram við strondini, eisini ferðast til gongu á útvaldum hagagøtum. Við hagagøtu meinast ein traðkað gøta í haganum. Bygdagøtur, útvaldar hagagøtur og fram við strondini verður sambært broytingini tær farleiðir, sum ferðafólk kunnu ganga av sínum eintingum, tó við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru nevndar í ásetingini annars.

Ad. 2
Tað er kommunan, sum í samráð við bóndan, tekur avgerð um, hvørjar hagagøtur skulu vera útvaldar sambært stk. 1. Hvørjar hagagøtur, ið eru útvaldar, skal greitt framganga av t.d. ferðavinnuætlanini hjá kommununi ella á øðrum lætt atkomiligum stað/miðli.

Ad. 3
Konsekvensbroyting av tí at útvaldar hagagøtur eisini eru fevndar av § 3.

Ad. 4
Við broytingini skal handilslig ferðavinna, umframt útinnast, eisini skipast í samráð við bóndan. Hetta merkir, at bóndin, tá tað er neyðugt, skal kunna leggja handilsligu ferðavinnuna í økinum til rættis soleiðis, at ferðafólk fáa sum mest burturúr túrinum, t.d. við at ein bólkur ferðast til eitt ávíst øki í senn.

Ad. 5
Við broytingini verður ásett, at bóndin, heldur enn at nokta virksemi, kann avmarka virksemi sambært teimum reglum, sum eru ásettar í § 11, stk. 3 (fjallgonga, haruveiða o.s.fr.). Aðramáta er talan um somu viðmerkingar sum í upprunauppskotinum.

Ad. 6
Við broytingini kann bóndin taka eitt rímiligt gjald frá ferðafólki, bæði tá talan er um handilsliga ferðavinnu, t.e. tá talan er um skipaðar túrar soleiðis, sum hesir eru allýstir í § 2 í lógaruppskotinum, og tá talan er um ferðafólk, sum ferðast einsamøll. Treytin fyri at kunna taka eitt gjald er, at bóndin afturfyri letur eina tænastu. Tað er sostatt ikki loyvt at taka gjald fyri atgongd; øll gjøld eru treytað av, at ein tænasta verður veitt fyri gjaldið. Ein tænasta er í hesum høpi skilmarkað sum ein veiting, sum goldið verður fyri, t.d. ein túrur við ferðaleiðara, atgongd at gjørdari gøtu, trygdarfyriskipan, ein matpakki, parkering, atgongd at vesi ella at vera til taks hjá ferðafólki ella ferðalagi. Gjaldið skal standa mát við ta tænastuna, sum verður veitt; talan skal ikki vera um eitt fjalt gjald fyri atgongd ella eitt ímyndað gjaldportur.

Ad. 7
Við broytingini fær landsstýrisfólkið heimild til at áseta nærri reglur um innihaldið í avtalum sambært ásetingini og at nágreina, hvørjar tænastur, ið bóndin kann taka eitt rímiligt gjald fyri.

Ad. 8
Við broytingini verður serstaka nevndin tikin úr, víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til broyting nr. 10 og 11. Í staðin verður ásett, at ferðavinnuætlanin skal gerast í samstarvi millum

kommunur, bøndur, heimafólk og aðrar viðkomandi partar. Í hesum sambandi er umráðandi, at serliga heimafólkið verður tikið við í arbeiðið at lýsa og skipa ferðavinnuvirksemið á staðnum og at gera ferðavinnuætlanina. Hetta kann gerast við at seta eina nevnd, sum er mannað við fólki á staðnum, og annars at skipa fyri borgarafundum, at kunna um ferðavinnuætlanina og at senda ferðavinnuætlanina til almenna hoyring. Til tess at útvega serkøna hjálp kunnu kommunurnar gera ferðavinnuætlanirnar saman við staðbundnu Visit-skrivstovuni og innlendis menningardeildini hjá Visit Faroe Islands, eins og tað ber til at heita á aðrar viðkomandi partur, t.d. Tjóðsavnið og Umhvørvisstovuna, um ráð og vegleiðing.

Ad. 9
Við broytingini verður skotbráið, ið kommunur saman við øðrum hava til at gera ferðavinnuætlanirnar, longt til 31. desember 2025. Hetta tí at mett verður, at ein slík ferðavinnuætlan fer at taka tíð at gera, og heldur enn at skunda hesar ígjøgnum, eigur arbeiðið at taka ta tíð, tað tekur.

Ad. 10 og 11
Við broytingini verður serstaka nevndin hjá heimafólki tikin úr lógaruppskotinum. Mett verður, at soleiðis sum skipanin við serstøku nevndini er orðað, verður talan um eina tunga skipan, ið fer at bureaukratisera ferðavinnuna í lutfalsliga stóran mun. Í staðin verður ásett, at heimafólkið verður tikið við, tá hetta er neyðugt, eitt nú tá ferðavinnuætlanir skulu gerast.

Ad. 12
Við broytingini verður nýtt stykki sett í ásetingina sum ásetur, at um ein bóndi tekur gjald fyri tænastu sambært § 5, stk. 3, so er tað viðkomandi bóndi, ið hevur ábyrgdina av at gera og viðlíkahalda tær farleiðir, har hann tekur gjald. Hetta tí at mett verður rímiligt, at bóndin við gjaldinum kann fíggja at gera og viðlíkahalda tær farleiðir, sum hann er ein partur av, við at hann tekur gjald.

Ad. 13
Mett verður ikki, at kommunan saman við bóndanum og heimafólkinum í skilhaldsreglunum fer at avmarka rættin at ferðast meira enn neyðugt, og tí verður teksturin strikaður.

Ad. 14
Konsekvensbroyting av at skilhaldsreglurnar verða fluttar í § 8.

Ad. 15 og 16
Við broytingini verður tað kommunan í samráð við bóndan, sum ásetur reglur um trygd heldur enn landsstýrisfólkið. Mett verður, at kommunan og bóndin eru tey, ið kenna økið best, og tí eru best før fyri at meta um trygd og vanda í økinum.

Ad. 17
Konsekvensbroyting av at § 12 verður broytt til § 11.

Ad. 18
Ásett verður, at øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt gistingargjald, sum er 20 kr. fyri náttina. Gjaldið kann í mesta lagi vera 200 kr. tilsamans, sum svarar til gisting í tíggju nætur. Fyri gisting eftir tíggjundu náttina verður einki gjald kravt.

Til tess at tryggja, at gjaldið verður tikið frá øllum ferðafólkum, sum sambært løgtingslógini hava skyldu at rinda gjaldið, verður gjaldið lagt aftur at øllum gistingum, sum goldið verður fyri. Talan er sostatt um gistingar á gistingarhúsum eins og gistingar á privatum bústøðum, sum verða leigaðir út um netborin sølutorg, t.d. kunningarstovur, Airbnb, booking.com o.tíl. Gjaldið verður somuleiðis lagt á gistingar á tjaldingarplássum, á campingplássum, í Ból og bita o.tíl.

Í øllum førum er tað útleigarin, t.e. ávikavist gistingarhúsið, privati útleigarin, tjaldingarplássið, campingplássið o.s.fr., sum hevur skyldu til at krevja gjaldið frá ferðafólkunum. Tað ber eisini til – um leigumálini verða umsitin av einum umsitingarfelag – at lata felagið taka sær av innkrevjingini og síðani rinda landinum gjaldið.

Er talan um smærri skip og bátar, t.d. seglbátar o.tíl., verður gjaldið roknað á sama hátt sum gjaldið fyri gistingar á gistingarhúsi o.tíl., t.e. 20 kr. fyri hvørja nátt, tó í mesta lagi 200 kr. tilsamans. Ferðafólk við cruise-skipum verða ikki áløgd gistingargjald sambært hesi lóg.

Gjaldið verður sum meginregla goldið landinum á sama hátt sum ferðagjald eftir løgtingslóg um ferðagjald. Hetta merkir, at burðardygdargjald, sum er kravt inn í einum mánaði, skal verða goldið TAKS í seinasta lagi tann 22. í øðrum mánaðinum eftir. Er gjaldið ikki goldið, tá ið freistin er úti, verða 0,7% roknað í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Gjald og renta, sum er fallin til gjaldingar, kann verða heintað inn við panting.

Tað er skyldan hjá gistingarhúsinum ella tí, sum stendur fyri útleiganini, at tryggja, at gjaldið verður kravt inn. Brot á hesa skyldu verður revsað við sekt.

Ad. 19
Ásett verður, at gjaldið, sum verður tikið inn eftir § 13, verður goldið í grunn. Peningurin í grunninum er markaður til at gera ferðavinnuætlanir, at gera og halda viðlíka gøtur í haganum, undir hesum eisini bygdagøtur, umframt til onnur átøk, sum skipa ferðavinnuna kring landið. Talan kann eitt nú vera um at seta í verk tiltøk, sum tryggja, at ferðavinnan minst møguligt ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólkið, mentan og mentanararv, eins og tiltøkini kunnu hava til endamáls at endurbøta náttúruna, tryggja fyrilit fyri náttúruligum, jarðfrøðiligum, mentanarligum og søguligum virðum og tilfeingi, menna trivnað, mentan og vinnumøguleikar á staðnum soleiðis, at tey órógva landbúnað og annað virksemi sum minst.

Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri, sum landsstýrisfólkið velur sambært treytunum, ið eru nevndar í ásetingini. Í sambandi við val av stýri skal miðast ímóti, at stýrið er umboðandi fyri øll øki í landinum.

Talan er um almennan grunn, og ásett verður tí, at grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum, at roknskaparhaldið skal fylgja løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a., og at roknskapurin verður grannskoðaður av landsgrannskoðanini. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur fyri virksemi hjá stýrinum, um umsiting, samsýning og virksemi grunsins og hevur eftirlit við grunninum.

Ásett verður at enda, at verður grunnurin tikin av, verða ognir grunsins fluttar landskassanum.

Ad. 20

Við broytingini fevnir stk. 1 eisini um brot á § 13 um burðardygdargjald.

Ad. 21
Konsekvensbroyting.

Ad. 22
Ásetingarnar um burðardygdargjald í § 13, grunn í § 14 og broytingin í lóg um ferðagjald í § 17 koma í gildi 1. oktober 2025. Hetta tí at ferðafólk longu nú kunnu bíleggja ferðir til komandi ár, og soleiðis at ferðafólk, ferðafyriskiparar og onnur kunnu fyrireika seg í góðari tíð til nýggju skipanina.

Ad. 23
Konsekvensbroyting av at ásetingin um burðardygdargjald varð broytt.

Ad. 24
Sett verður inn nýggj áseting um aðalorðaskifti um burðardygga ferðavinnu í Føroyum. Sambært ásetingini skal landsstýrisfólkið áðrenn 1. oktober annað hvørt ár leggja fyri Løgtingið frágreiðing um ferðavinnuna í Føroyum. Frágreiðingin skal viðgera gongdina og støðuna í ferðavinnuni og um framtíðarútlit. Frágreiðingin skal viðgera búskaparlig, samfelagslig og vinnulig viðurskifti av týdningi fyri ferðavinnuna. Onnur viðurskifti kunnu eisini lýsast, herundir nýggj lóggáva/kunngerðir og framtíðar ætlanir hesum viðvíkjandi.

Ad. 25
Sambært broytingini verður gjaldið, sum ferðafólk við cruise-skipum rinda, flutt í grunnin, sum er ásettur í løgtingslógini. Við hesum koma inntøkurnar frá ferðaavgjaldinum frá ferðafólkum við cruise-skipum eisini í grunnin, sum umsitur burðardygdargjaldið.

Ad. 26
Við broytingini verður staðfest, at íbúgvar landsins, ið hava frítt at fara í føroysku náttúruni, altíð ferðast undir ábyrgd, og tí skulu vísa vanligt fyrilit fyri náttúru, fenaði og øðrum.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Árni Skaale og Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Eftir drúgva viðgerð í Vinnunevndini verður álit skrivað. Tíverri eydnaðist ikki at fáa fulla semju, hóast bæði meiriluti og minniluti eru samd um nógvar broytingar.

Hóast nógvar góðar broytingar eru frá meirilutanum, so heldur minnilutin, at lógaruppskotið framvegis ger seg ov nógv inn á avgerðarrættin hjá jarðareigarum.

Vinnunevndin er øll samd um rættin hjá íbúgvum landsins at ganga í haga. Minnilutin mælir tó til, at avmarking kann verða, tá talan er um fjallgongu, veiðu, lembing, haruveiðu o.s.fr.

Út frá mongu hoyringunum í Vinnunevndini er komið týðiliga fram frá ferðavinnuaktørum, at eingir trupulleikar eru at fáa atgongd til náttúruna. Onkustaðni er eitt lítið gjald, og flesta staðni er tað ókeypis. Minnilutin mælir tí til, at haldast kann fram við, at ferðavinna kann skipast í avtalu við bøndur. Harvið er ognar- og avgerðarrætturin óskalaður.

Bæði minniluti og meirilutin eru samd um, at bóndin kann taka gjald. Eisini eru vit samd um, at so má bóndin gera og halda gøtur. Nú eru bara bygdagøtur eftir, og at halda tær hevur kommunan til uppgávu longu í dag. So her verður einki broytt.

Tí mælir minnilutin frá at koma við enn fleiri gjøldum, sum tað er komið ríkiligt av frá hesi samgonguni. Eitt gjald á hotelkømur og Airbnb kann verða ein forðing fyri vaksandi ferðavinnu, og tí kann tað skaða menningina. Ferðavinna við cruise-skipum er vaksandi, og kann eitt nýtt gjald á hesa vinnu verða ein forðing fyri vøkstri ella í ringasta føri minka munandi um hesa vinnu.

Tá vit ikki áleggja kommunum nýggjar útreiðslur, skuldi heldur ikki verið neyðugt at komið við fleiri gjøldum.

Minnilutin setur tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 3 verður orðað soleiðis:
"**§ 3**. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í ferðavinnuætlanum sbrt. § 6 í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, í øðrum løgtingslógum og lógum, kunnu ferðafólk ferðast til gongu undir egnari ábyrgd á útvaldum bygdagøtum. Kommunan tekur avgerð um, hvørjum bygdagøtum gangast kann eftir.

**2.** Í § 3 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Fyri atgongd til ávíst øki kann bóndin krevja eitt gjald."

**3.** § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Øll, sum ferðast ella uppihalda sær á bygdagøtum, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru náttúru, fenaði, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa."

**4.** Í § 5, stk. 1 verður aftan á "útinnast" sett: "og skipast".

**5.** § 5, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Í sambandi við handilsliga ferðavinnu kann bóndin taka gjald."

**6.** § 5, stk. 3 verður strikað.

**7.** § 6, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Allar kommunur skulu, saman viðkomandi áhugapørtum og í semju við bøndur gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað og fyriskipað soleiðis, at tað í minst møguligan mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar."

**8.** Í § 6, stk. 3 verður "2025" broytt til: "2026".

**9.** Yvirskriftin yvir § 7 verður strikað.

**10.** § 7 verður strikað.

**11.** § 8, stk. 3, sum verður § 7, stk. 3, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3*. Tað er ábyrgdin hjá viðkomandi bónda at gera og halda farleiðirnar, har hann tekur eitt gjald sambært hesi lóg, bæði innangarðs og uttangarðs."

**12.** § 9, stk. 1, 2. pkt., sum verður § 8, stk. 1, 2. pkt., verður strikað.

**13.** Í § 10, sum verður § 9, verður "§ 9" broytt til: "§ 8".

**14.** § 11, stk. 1, sum verður § 10, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Kommunan kann, í samráð við bóndan, áseta reglur um, at tað í økjum, har serliga vandamikið er at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast saman við staðkendum fólki."

**15.** Í § 11, stk. 2, sum verður § 10, stk. 2, verður "Landsstýrisfólkið" broytt til: "Kommunan".

**16.** § 12, stk. 1, sum verður § 11, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Ikki er loyvt bóndanum at seta upp gjaldportur, uttan at hetta frammmanundan er góðkent av kommununi."

**17.** § 12, stk. 2 verður strikað.

**18.** § 12, stk. 3, sum verður § 11, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Bóndin kann avmarka ferðslu og uppihald, sum órógva landbúnaðarvirksemi ella veiðu, t.d. lembing, fjallgongu og haruveiðu. "

**19.** § 12, stk. 4 verður strikað.

**20.** Í § 13, stk. 1, sum verður § 12, stk. 1, verður "§ 12" broytt til: "§ 11".

**21.** Yvirskriftin yvir § 14 verður strikað.

**22.** § 14 og § 15 verða strikaðar.

**23.** § 16, stk. 1, sum verður § 14, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í § 4, stk. 1 og 2, § 5, stk. 1, og § 11, stk. 1 og 2."

**24.** Í § 16, stk. 3, sum verður § 14, stk. 3, verður "§ 9" broytt til: "§ 8" og "§ 13" broytt til: "§ 12".

**25.** § 17, stk. 2 og 3 verða strikað.

**26.** Aftan á § 17, sum verður § 15, verður sett:
"**§ 16**. Landsstýrisfólkið setur í løgtingsárinum 2029 fram løgtingslógaruppskot um endurskoðan av løgtingslógini."

**27.** Yvirskriftin yvir § 18 verður strikað.

**28.** § 18 verður strikað.

**29.** § 19, nr. 1, sum verður § 17, nr. 1, verður orðað soleiðis:
"Í § 41 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Ásetingin í 1. pkt., 1. liði, er ikki galdandi fyri íbúgvar landsins, sum tí hava frítt at fara við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í §§ 8, 10 og 11 í lóg um burðardygga ferðavinnu.""

Viðmerkingar:
Ad. 1
Við broytingini kunnu ferðafólk einans ferðast undir egnari ábyrgd á útvaldum bygdagøtum og ikki uttangarðs og fram við strondini. Tað er kommunan, sum tekur avgerð um, hvørjar bygdagøtur eru útvaldar.

Ad. 2
Við broytingini fær bóndin heimild at krevja gjald fyri atgongd til ávíst øki.

Ad. 3
Við broytingini fevnir ásetingin bara um ferðslu á bygdagøtum.

Ad. 4
Við broytingini skal handilslig ferðavinna, umframt útinnast, eisini skipast í samráð við bóndan. Hetta merkir, at bóndin, tá tað er neyðugt, skal kunna leggja handilsligu ferðavinnuna í økinum til rættis soleiðis, at ferðafólk fáa sum mest burturúr túrinum, t.d. við at ein bólkur ferðast til eitt ávíst øki í senn.

Ad. 5
Við broytingini kann bóndin taka eitt gjald fyri atgongd.

Ad. 7
Við broytingini verður serstaka nevndin tikin úr, víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til broyting nr. 9 og 10. Í staðin verður ásett, at ferðavinnuætlanin skal gerast í samstarvi millum kommunur, bøndur og aðrar viðkomandi áhugapartar.

Ad. 8
Við broytingini verður skotbráið, ið kommunur saman við øðrum hava til at gera ferðavinnuætlanirnar, longt við einum ári til 1. juni 2026. Hetta tí at mett verður, at ein slík ferðavinnuætlan fer at taka tíð at gera, og heldur enn at skunda hesar ígjøgnum, eigur arbeiðið at taka ta tíð, tað tekur.

Ad. 9 og 10
Við broytingini verður serstaka nevndin hjá heimafólki tikin úr lógaruppskotinum. Mett verður, at soleiðis sum skipanin við serstøku nevndini er orðað, verður talan um eina tunga skipan, ið fer at bureaukratisera ferðavinnuna í lutfalsliga stóran mun. Í staðin verður ásett, at heimafólkið verður tikið við, tá hetta er neyðugt, eitt nú tá ferðavinnuætlanir skulu gerast.

Ad. 11

Við broytingini verður nýtt stykki sett í ásetingina sum ásetur, at um ein bóndi tekur gjald fyri atgongd sambært hesi lóg, so er tað viðkomandi bóndi, ið hevur ábyrgdina av at gera og viðlíkahalda tær farleiðir, har hann tekur gjald. Hetta tí at mett verður rímiligt, at bóndin við gjaldinum kann fíggja at gera og viðlíkahalda tær farleiðir, sum hann er ein partur av við at hann tekur gjald.

Ad. 12
Mett verður ikki, at kommunan saman við bóndanum og heimafólkinum í skilhaldsreglunum fer at avmarka rættin at ferðast meira enn neyðugt, og tí verður teksturin strikaður.

Ad. 13
Konsekvensbroyting av at skilhaldsreglurnar verða fluttar í § 8.

Ad. 14 og 15
Við broytingini verður tað kommunan í samráð við bóndan, sum ásetur reglur um trygd heldur enn landsstýrisfólkið. Mett verður, at kommunan og bóndin eru tey, ið kenna økið best, og tí eru best før fyri at meta um trygd og vanda í økinum.

Ad. 16
Við broytingini skulu gjaldportur góðkennast av kommununi frammanundan. Hetta fyri at sleppast kann undan, at bøndur av sínum eintingum seta upp gjaldportur, ið tarna ferðsluni óneyðugt.

Ad. 17
Við broytingini verður forboðið hjá bóndanum uttan serstaka heimild at seta skelti ella á annan hátt kunngera forboð fyri lógligari ferðslu og uppihaldi strikað.

Ad. 18
Við broytingini kann bóndin avmarka ferðslu og uppihald, sum órógva landbúnaðarvirksemi ella veiðu.

Ad. 20
Konsekvensbroyting.

Ad. 21 og 22
Ásetingarnar um burðardygdargjald verða strikaðar.

Ad. 23, 24 og 25
Konsekvensbroyting.

Ad. 26
Sett verður inn ein nýggj áseting um endurskoðan av løgtingslógini. Sambært ásetingini skal landsstýrisfólkið í løgtingsárinum 2029 seta fram løgtingslógaruppskot um endurskoðan av løgtingslógini. Talan er um eina nýskipan, sum umframt at skipa ferðavinnuna eisini hevur ásetingar um gjald fyri m.a. gisting, og tí verður mett neyðugt, at løgtingslógin verður eftirmett, tá ið hon hevur virkað eina tíð.
Ásetingin merkir ítøkiliga, at í løgtingsárinum 2029 setur landsstýrisfólkið fram løgtingslógaruppskot um broytingar ella tillagingar í løgtingslógini, um tørvur er á tí.

Ad. 27 og 28
Konsekvensbroyting av at burðardygdargjaldið verður strikað.

Ad. 29
Við broytingini verður staðfest, at íbúgvar landsins, ið hava frítt at fara í føroysku náttúruni, skulu verða fevndir av ásetingunum um skilhaldsreglur, trygd og ólógligar forðingar í lóg um burðardygga ferðavinnu.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 15. mai 2024**

Erhard Joensen
formaður

Annika Olsen
næstforkvinna

Eyðdis Hartmann Niclasen

Jørgen Niclasen

Árni Skaale

Uni Holm Johannesen

Karlot Hergeirsson